# rmarknaðinum



*Mest navnframa skiftið var uttan iva, tá Christian Høgni Jacobsen í heyst boðaði frá, at hann nú fer at royna seg í HB*

Liðið, sum endaði á triðja plássi í fjør, B36, hevur eisini styrkt sær nakað um hópin. Klaksvíkingarnir Ovi Nysted og Allan Mørkøre vera báðir í felagnum komandi kappingarárið, og afturat sær hava teir fingið Helga L. Petersen, sum er komin úr NSÍ. Heini í Skorini verður eisini partur av B36-liðnum komandi árið. Hann hevur verið í Danmark í lestrarørindum í nøkur ár, men nú hann er komin heim aftur á klettarnar, er hann klárur at leypa í eldin fyri barndómsfelagið, B36.

## Stór útskifting í Runavík

KÍ og NSÍ eru tvey av feløgunum, sum endaðu beint uttan fyri heiðursmerkini seinasta kappingarár, og hesi bæði hava eisini havt ávísar útskiftingar á liðnum fram til komandi kappingarár. Serliga NSÍ hevur verið aktivt á transfermarknaðinum, og fleiri rættiliga stór nøvn hava leitað sær til Løkin at spæla fótbólt komandi kappingarár.

Landsliðsleikararnir, Jonhard Frederiksberg og Hjalgrím Eltør eru báðir nýggir menn í NSÍ-búnanum. Eisini tveir útlendingar vera at finna í Runavík komandi kappingarár. Sterki miðvallarin, Nenad Stankovic, sum var á Skála síðsta kappingarár, og áleyparin, Anderson Castilho, sum er komin úr B68, hava báðir leitað sær út til Runavíkar, so liðið hjá NSÍ sær spennandi út.

Fleiri av ungu leikarunum, sum hava verið leigaðir út til onnur feløg í landinum, eru eisini komnir heim aftur til Runavíkar. Her er talan um Johan Troest Davidsen og Debes Danielsen, sum báðir hava verið á Skála, Tórður Thomsen, sum hevur veið á Toftum, og Hjalmar Dalbúð, sum hevur verið hjá ÍF.

NSÍ hevur tó eisini mist eitt sindur av fólki, og serligur missur verður helst í toppskjúttanum, Christian Høgna Jacobsen, sum hevur valt at royna eydnuna í HB.

Eisini KÍ hevur skift nakað av fólki út. Atli Danielsen, Hjalgrím Eltør, Christian Lundberg og Sinisa Jovanovic vera ikki í felagnum komandi kappingarár, men KÍ hevur funnið nýggjar leikarar í teirra stað. Kaj Ennigarð og Gunnar G. Nielsen eru báðir komnir úr GÍ, og tveir útlendingar eru eisini komnir til felagið. Her er talan um amerikumannin, Kareen Smith, og onglendingin, Chris Cerony.

## Stór frágongd á Skála

Skála er eitt av feløgunum, sum hevur havt størst frágongd eftir síðsta kappingarárar. Jonhard Frederiksberg, Nenad Stankovic, Bjarni Jørgensen, Johan Troest Davidsen og Debes Danielsen eru allir farnir í annað felag, men Skála hevur tó eisini styrkt seg við onkrum leikarum.

Obi skal taka yvir plássið í álopinum eftir Jonhard, og Tony Rasmussen er eisini komin til felagið úr AB. Skála hevur eisini funnið sær ein nýggjan málmann. Teir hava styrkt seg við fyrrverandi TB-málmanninum, Predrag Markovic, og afturat hesum trimum, hevur Skála eisini fleiri nýggjar ungar leikarar í formulahópinum.

GÍ er helst tað felagið, sum hevur verið mest friðarligt á transfermarknaðinum. Teir hava mist Kaj Ennigarð og Gunnar G. Nielsen, sum báðir eru farnir til KÍ, og Hanus Jacobsen, sum er farin til AB.

Teir hava tó fingið tríggjar nýggjar leikarar, og hesir eru Atli Gregersen, sum hevur verið í felagnum fyrr, Poul Johannus Justinusen, sum er komin úr NSÍ, og so er ein nýggjur póllendingur, Thomasz Sajdak, eisini komin til felagið.

VB/Sumba hevur eisini verið eitt av friðarligu feløgunum. Teir hava skift út á málmansplássinum, har Vlada Filipovic, sum var á Skála í fjør, hevur tikið yvir eftir Marcin Dawid, sum skifti til HB. Annars hevur verið rættiliga friðarligt í sunnaru hálvu av Suðuroynni. Teir hava styrkt seg við onkrum ungum leikarar úr Suðuroynni, og annars hevur felagið eisini mist Aco Pandurovic og Tummas Paula Olsen.

## Uppflytararnir hava styrkt seg

Uppflytararnir hava tað ofta strævið í teirra fyrsta ári í formuladeildini, men bæði B71 og AB hava styrkt um hópin í teirra royndum at yvirliva í bestu deildini.

B71 fekk eitt skot fyri bógvin fyri nøkrum vikum síðani, tá liðið mátti siga farvæl við liðskiparan, Bergleif Sólsker, sum valdi at halda fram hjá TB. Eisini danin, Asbjørn Hveldlund, er farin frá liðnum, men hetta eru eisini einastu leikararnir, sum B71 hevur mist.

Teir hava tó eisini styrkt sær nakað um hópin. Tveir nýggir brasiliumenn og ein dani eru komnir til felagið, og hesir skulu vera við til at halda felagnum í bestu deildini.

Hin uppflytarin, AB, hevur eisini mist onkran av sínum týdningarmestu leikarum. Rúni Nosøe og Allan Mørkøre eru farnir í onnur feløg, og eisini argjamaðurin, Tony Rasmussen, hevur leitað sær í nýtt felag.

AB hevur tó fingið nógvar nýggjar leikarar í hópin. Bjarni Jørgensen, Fróði Clementsen, Súni Fríði Barbá, Hanus Jacobsen, Hendrik Rubeksen, Bogi Hermansen, Magnus Poulsen og Danny Rasmussen skulu allir vera við til at styrkja AB-liðið komandi kappingarár, og afturat teimum vera eisini tveir danir.

Einki er at ivast í, at uppflytararnir kunnu fáa tað strævið, men tey hava tó bæði roynt at styrkt seg í teirra royndum at yvirliva í formuladeildini.



*Poul Johannus Justinusen frá NSÍ og Thomasz Sajdak úr Póllandi avmyndaðir saman við Andreas Poulsen frá GÍ*

**NSÍ 13 spælarar:**

Tilgongd: Jonhard Frederiksberg frá Skála
Nenad Stankovic frá Skála
Hjalgrím Eltør frá KÍ
Anderson Castilho frá B68
Johan Troest Davidsen frá Skála
Debes Danielsen frá Skála
Tórður Thomsen frá B68
Hjalmar Dalbúð frá ÍF
Øssur Dalbúð nýggjur í formulahópinum

Frágongd: Christian Høgni Jacobsen til HB
Viggo Johannesen fyribils givin
Brynjálvur Nielsen MB
Helgi L. Petersen til B36

**Skála 14 spælarar:**

Tilgongd: Tony Rasmussen frá AB
Predrag Markovic frá TB
Obele Okeke Onyebuchi frá B36
Hans Jørgensen nýggjur í formulahópinum
Erland Berg Danielsen nýggjur í formulahópinum
Petur Pauli Mikkelsen nýggjur í formulahópinum
Jógvan G. Joensen nýggjur í formulahópinum
Jógvan Berg nýggjur í formulahópinum

Frágongd: Jonhard Frederiksberg til NSÍ
Nenad Stankovic til NSÍ
Bjarni Jørgensen til AB
Johan Troest Davidsen til NSÍ
Vlada Filipovic il VB/Sumba
Debes Danielsen NSÍ

**B36 6 spælarar:**

Tilgongd: Helgi L. Petersen frá NSÍ
Ovi Nysted frá KÍ
Allan Mørkøre frá AB
Heini í Skorini úr Danmark

Frágongd: Bogi Hermansen til AB
Amed Davy Sylla er óvissur

**GÍ 6 spælarar:**

Tilgongd: Atli Gregersen úr Danmark
Thomasz Sajdak úr Póllandi
Poul Johannus Justinusen frá NSÍ

Frágongd: Kaj Ennigarð til KÍ
Gunnar G. Nielsen til KÍ
Hanus Jacobsen til AB

**B71 8 spælarar:**

Tilgongd: Fabio Vieira frá Brasilia
Flavio Lucio de Santana frá Brasilia
Anders Rasmussen frá Skjold
Tummas Clementsen nýggjur í formulahópinum
Høgni Midjord nýggjur í formulahópinum
Meinhard Winther nýggjur í formulahópinum

Frágongd: Bergleif Sólsker til TB
Asbjørn Hveldlund aftur til Danmarkar